# Fyrsti flogtúrur við









**Klokkan eitt korter til seks seinnapartin í gjár setti British Aerospace flogfarið hjá Faroe Jet seg fyri fyrstu ferð á vøllinum í Vágum**

FLOGFERÐSLA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

**Flogvøllurin:** Nógv fóllk vóru til móttøkuna, sum FaroeJet skipaði fyri á flogvøllinum í sambandi við at flogfar teirra fyrstu ferð kom til Føroya og at felagið feru undir regluliga rutuflúgving millum Føryar og Danmark í morgin.

Stjóri og leiðsla fegnaðust sum vera man um loksins at verða rokkin á mál. Felagið varð stovnað í desember í fjør, og longu nú, hálvt ár senni, fer felagið undir rutuflúgving.

- Hetta má vera met, helt Jóhan Simonsen, stjóri felagsins, sum viðgekk, at tað var ikki við sørt av summarfuglum í búkinum, at hann spentur bíðaði flogfarinum.

- Eg havi ongantíð sæð flogfarið áður - og tað er komið beinleiðis úr sproytukabinuni á verksmiðjuni í Onglandi, segði Jóhan Simonsen.

Tað vóru brøðurnir Hans Meinhard og Oddmar á Høgabóli flugu tað til Føroya.

## Kom og keyp ein flúgvara

Knút Lützen, nevndarformaður í FaroeJet og stjóri í Safari Transport, var sera fegin, Hann heldur, at tað so avgjørt er tørvur á kapping og at kapping er sunt fyri øll. Hann greiddi eisini frá eini søgu um, at grannin hjá Safari Transport í Stiðjagøtu í Havn, Eyðun Jespersen, í áravís hevur plágað hann um at koma at keypa ein flúgvara. Kanska meint í skemti - men kortini við tørvinum á at fáa flogpakkar við flúgvara til Føroya í huga.

- Tá Jógvan Simonsen so ringdi til mín og spurdi, um eg vildi vera við til at stovna eitt flogfelag, spurdi hann eisini, um eg kendi nakran, sum vildi vera við, greiddi Knút Lützen frá.

- Eg svaraði beinanvegin, at tað visti eg, og so ringdi eg til Eyðun og segði, at nú fara vit at keypa ein flúgvara!

## Beyð starvsfólki at búsetast í Sørvági

Borgarstjórin í Sørvági, Jákup Suni Lauritsen beyð eisini felagnum og flogfarinum vælkomnum í kommununa. Hann beyð eisini øllum starvsfólkum vælkomnum at búsetast í kommununi, eins og hann heitt á øll um at standa saman um flogvøllin í Vágum.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í Vinnumálum vísti á, at nú var eitt nýtt kapittul í føroyskari flogsøgu skrivað. Hann fegnaðist serliga um, at samferðslan verður so væl útbygd, alt til frama fyri brúkaran. Hann nam eisini við álitið um byggjan






*Flogskiparanir á fyrsta túrinu, brøðurnir Oddmar og Hans Meinhard á Høgabóli, fingu sóljuheilsanir frá smágentum í føroyskum klæðum, og nógv fólk var á samkomuni í terminalinum*